Kvívíkar kirkja 100 ár:

# Hátíðardámur var yvir Kvívík sunnudagin



*Fríggjakvøldið 12. desember høvdu musikkskúlin og skúlin í Kvívík framførslur í kirkjuni. Lampurnar uppi undir loftinum hevur Høgni Larsen, arkitektur, designað*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Sunnudag 14. desember var hátíðardagur í Kvívík í sambandi vað at kirkjan fylti 100 ár. Hátíðarhaldið byrjaði fríggjakvøldið 12. desember og sunnudagin var gudstænasta og kirkukonsert**

13. desember 1903 varð nýggja kirkjan á Kirkjuteigi í Kvívík vígd og sunnudagin 14. desember 2003 var stórt hátíðarhald í bygdini.

Hátíðarhaldið byrjaði fríggjakvøldið 12. desember við at musikkskúlin og skúlin í Kvívík høvdu framførslur í kirkjuni.

Hátíðardagin varð guðstænasta við altargongd, har Bjarni Bæk, dómpróstur, prædikaði.

Eftir gudstænastuna var døgurði fyri eini 300 fólkum í Glæmuni í Kvívík. Har vórðu røður hildnar av Marjun Bæk, sóknarpresti, Grækaris A. Joensen, formanni í kirkjuráðnum og Bjarna Bæk, dómpresti. Eisini hugleiddu Rólant, fyrrverandi lærari í Kvívík, og kvívíkingurin, Viggo Johannesen.

Seinnapartin sama dag kl.16.30 varð fjølbroytt konsert við advents- og jólatónleiki, m.a. sang barnakór í Kvívík. Vestmanna Sangkór sang saman við sangarum úr Kvívík, og afturvið nøkrum av løgunum spældu tónleikarar úr Musikkskúlanum á floytu, klarinett og fagott. Urguleikari var Heðin Kambsdal.

Fyri at markera 100 ára dagin hevði Kvívíkar kirkjuráð heitt á kórleiðaran Kára Bæk um at fáa onkra nýggja framførslu til hátíðarkonsertina. Hann vendi sær síðan til teir tríggjar, Edvard Nyholm Debes, Atla K. Petersen og Kristian Blak, sum gjørdu nýggjar útsetingar av ávísum advents - og jólasálmum fyri kór tey trý blásiljóðførini floytu, klarinett og fagot.

Aðrir tónleikarar sum luttóku vóru: Andrea Heindriksdóttir, Peder Riis Jensen og Christine Andersen. Konsertin varð endurtikin í mánakvøldið 15. desember í Vestmanna kirkju.



*Bjarni Bæk, dómpróstur, helt prædikuna hátíðardagin*

*Mynd : Jens Kristian Vang*



*Barnakórið hjá Petru Iversen í Kvívík luttók eisini í hátíðarhaldinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Her er Jona Jacobsen við dóttrini, sum bleiv doypt hendan dagin og fekk navnið Jana, eftir langommuni, Janu, sum bleiv doypt, tá kirkjan bleiv vígd fyri 100 árum síðan*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Eftir gudstænastuna var døgurði fyri umleið 300 fólkum í Glæmuni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Vestmanna sangkór luttók eisini í hátíðarhaldinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Ívar Iversen, fyrrverandi útvarpsmaður, er organistur í Kirkjuni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*